# Óvissa um ognarrætt neyvan ávirkan á Atlants Kolvetni

**– Eg kann ikki hugsa mær, at tað fer at ávirka ætlanirnar um at víðka partapeningin í felagnum komandi vár, at óvissa er sádd um ognarrættin til rávevni og undirgrund sigur nevndarformaðurin í Atlants Kolvetni, Kjartan Hoydal**



*Kjartan Hoydal um óvissuna um ognarrætt til ráevnini: – Eg veit ikki um, at nakar partaeigari í Atlantic Petroleum hevur vent sær til felagið um hendan spurning, og eg kann ikki hugsa mær, at tað fer at ávirka ætlanirnar um at víðka partapeningin í felagnum komandi vár*

OLJA OG OGNARRÆTTUR
*Jan Müller*

Skulu vit ganga eftir metingini hjá nevndarformanninum íføroyska oljufelagnum, Atlants Kolvetni, Kjartan Hoydal, so fer tað neyvan at hava nakra ávirkan á eina komandi partafelagstekning hjá felagnum, at tað hevur verið sáddur ivi um, hvør eigur ráevnini í føroysku undirgrundini. Hann vísir til, at somu óvissu hava vit havt viðvíkjandi fiskiskapinum undir Føroyum síðan 1977. Eingin ivast t.d. um, at vit hava fingið umsitingina av hesum tilfeingi – latin okkum upp í hendi av donskum myndugleikum.

## Fólkatingsvalið

Tað var í sambandi við fólkatingsvalið at nomið varð við spurningin um ognarrættin til ráevnini og til undirgrundina. Frá politiskari síðu varð aftur sáddur ivi um, hvør eigur rættin til ráevnini í undirgrundini. Hetta kundi fingið fólk, sum hava sett pening í felagið ella sum ætla sær at keypa partabrøv, at ivast í, hvussu tryggur peningur teirra í veruleikanum er.

Vit hava spurt nevndarformannin í føroyska oljufelagnum Atlants Kolvetni, Kjartan Hoydal, um óvissan, sum sádd er til henda ognarrætt er til ampa fyri føroyingar og onnur sum vilja keypa partabrøv í t.d. Atlantic Petroleum.

## Mugu sjálvi meta um váðan

Kjartan Hoydal sigur, at tey, sum vilja gera íløgur í oljufeløg, mugu, sum oljufeløgini sjálv, meta um óvissur og váða og vísir á, at her er nógv at hugsa um. Váðin av at brúka pening upp á seismikk, sum ikki gevur úrslit, váðin fyri at bora ein turran brunn, sannlíkindini fyri at finna olju, tøkniligi váðin í sjálvum boringunum, váðin við prísbroytingum, rentubroytingum ella valutakursbroytingum o.a. Tað kann eisini koma upp á tal, serliga í pørtum av heiminum har politisku viðurskiftini eru ótrygg, at meta um politiskan váða.

– Eg eri ikki varugur við, at tað, sum danski løgmálaráðharrin segði í Fólkatinginum 15. mars 2001 um, at danski ognarrætturin til undirgrundina var óbroyttur, gjørdi, at ein politiskur váði er tikin við í váðametingarnar av oljuni undir Føroyum. Heldur ikki er væntandi, at politiskt orðaskifti um ognarrættin til undirgrundina upp undir fólkatingsvalið, sum partur av orðaskiftinum um ríkisrættarligu støðuna, fara at gera hetta nú. Sjálvandi verður lagt merki til viðmerkingar frá einum donskum ráðharra og frá varaløgmanni. Upp aftur meira verður lagt merki til um tílíkar politisku viðmerkingar av øðrum politikarum, serfrøðingum og fjølmiðlum verða lagdar út sum álop á brúks- og umsitingarrættin, rættin til at gagnnýta ráevnini í undirgrundini.

Kjartan Hoydal sigur víðari, at oljufeløg og fólk, sum vilja gera íløgur, mugu haldast sjálvi at duga at lesa avtaluna um undirgrundina frá 1992 og síggja helst orðini hjá danska løgmálaráðharranum og føroyskum politikarum fyri tað tey eru, leikir í ósemjuni um ríkisrættarligu støðu Føroya. Tey síggja hetta ikki sum eitt álop á rættin til at gagnnýta ráevni í undirgrundini, sum danska stjórnin við undirgrundaravtaluni í 1992 hevur latið Føroya landsstýri, bert við treytum viðvíkjandi blokkstuðlinum, sum eru oljuvinnuni óviðkomandi.

## Sama óvissa við fiski

Nevndarformaðurin í Atlants Kolvetni, sum eisini hevur drúgvar royndir frá fiskivinnuni vísir á, at vit hava havt somu óvissu viðvíkjandi fiskiskapinum undir Føroyum síðan 1977. Eingin ivast um, at vit hava fingið umsitingina av hesum tilfeingi – latin okkum upp í hendi av donskum myndugleikum. Svarið hjá einum donskum løgmálaráðharra hevði tí helst verið hitt sama, um eitt orðaskifti um ognar- ella yvirvaldsrætt tók seg upp í samband við fiskivinnuna sigur Kjartan Hoydal og heldur fram:

– Eg havi sjálvur fingið spurningin frá summum av teimum londum Føroyar hava samráðst við um fiskimøguleikar. Spurningurin kom oftast upp í samband við, at danska sjóverjan var uppi í fiskiveiðieftirlitinum undir Føroyum. Men hóast spurningurin kom upp, haldi eg ikki tað hevði týdning fyri seinni avtalur.

Kjartan Hoydal sigur seg annars ikki vita um, at nakar partaeigari í Atlantic Petroleum hevur vent sær til felagið um hendan spurning, og hann kann tí ikki hugsa sær, at tað fer at ávirka ætlanirnar um at víðka partapeningin í felagnum komandi vár.

# Foreldur steðga gjaldi fyri ansing

**Foreldur vilja hava at vita frá býráðnum, hvørjari støðu tey eru í, um tey nokta at rinda brúkaragjaldið fyri ansingarpláss, nú pedagogarnir eru í verkfalli. Foreldur meta, at tað er órímiligt at tey skulu gjalda rokningina og einki fáa afturfyri**

VERKFALL
*Stefan í Skorini*

Fleiri foreldur at børnum, ið eru rakt av verkfallinum, eru farin at gera vart við seg. Tey meta ikki, at tey skulu gjalda fult ansingargjald fyri dagstovnapláss, meðan børnini ganga heima.

– Vit halda, at tað er órímiligt at krevja brúkaragjald fyri nakað, vit ikki brúka, sigur Maja Jakobsen, ið er nevndarlimur í Drotning Ingridar barnagarði. Hon er foreldraumboð í nevndini.

Hon hevur tí vegna foreldrini sent býráðnum og Heðini Mortensen ein fyrispurning. Har verður heitt á myndugleikarnar um at skunda undir at finna eina loysn á trætuni, og spurt verður um, »hvussu tey eru stillað« um tey ikki gjalda. Brævið varð sent mikudagin.

Fleiri foreldur hava vent sær til Maju og spurt, hvussu tey skulu fara fram, og hvussu landið liggur hesum viðvíkjandi. Tí hevur hon tikið stig til henda fyrispurning.

Alt fleiri foreldur hava tikið avgerð um, at fasta flytingin til dagstovnin verður steðgað, so leingi teimum ikki verður veitt barnaansing.

Verkfallið byrjaði 20. november, og tað hevur tískil verið í næstan tvær arbeiðsvikur. Hesar dagarnar hava foreldur verið noydd at fáa sær barnagentur, ið eisini skulu hava løn. Onnur hava mist arbeiðsdagar og harvið løn, tí tey hava verið heima hjá børnunum.

## Løgfrøðingur ivast

Í útvarpinum fríggjamorgunin varð Sigmund Poulsen spurdur, um foreldur eiga at gjalda, nú barnaansingin liggur lamin.

Hann heldur, at foreldur eiga at gjalda fyri barnaansingina ta fyrstu tíðina, hóast børnini ikki verða ansaði. Tó leggur hann afturat, at hetta kann ikki halda fram í longri tíð, um verkfallið verður drúgt, og partarnir ikki finna semju.

Fyrispurningurin hjá Maju Jakobsen er sendur Heðini Mortensen.

– Eg skilji væl kravið frá foreldrum um, at tey ikki vilja gjalda brúkaragjaldið fyri nakað tey ikki brúka, og at tey seta spurnaðartekin við hetta, sigur Heðin Mortensen.

Hann heldur, at um verkfallið heldur fram í næstu viku, so fer tað at tátta í, og foreldrini mugu fáa viðhald á onkran hátt. Hann sigur tó, at hann ikki hevur fingið fyrispurningin í hendi enn, og at hann tí ikki hevur viðgjørt hann í býráðnum.

– Vit kunnu ikki blíva við at krevja pening, tá einki verður givið afturfyri, sigur Heðin Mortensen.

Býráðið hevur steðgað lønum til pedagogar, og sparir tí meira 100.000 krónur um dagin.